# Løgreglan á skeið um arbeiðsumhvørvi

**Løgreglan í Føroyum hevur seinastu tíðina verið á skeið hjá Arbeiðseftirlitinum og donskum serfrøðingum um arbeiðsumhvørvi**



*Løgreglan í Føroyum eru farið at kanna seg sjálvt. Ì hesi vikuni vóru tey á síðsta parti av einum skeiði um arbeiðsumhvørvi.*
*Mynd: Jens Kristian Vang.*

SKEIÐ
*Heri á Rògvi*

Heldur fyrivarin enn eftirsnarin.

Tugda orðafellið kann væl nýtast í hesum samanhanginum. Føroyska løgreglan, sum vanliga hevur eftirlit við øllum okkum, hevur seinastu tíðina hugt meira at sær sjálvum.

Evnið er arbeiðsumhvørvi. 23 fólk frá løgregluni í Føroyum hava verið á skeið. Við á skeiðinum eru fólk frá Arbeiðseftirlitinum og tveir lærarar av Politi skúlanum í Danmark.

Luttakararnir á skeiðnum eru bæði løgreglufólk og skrivstovufólk hjá løgregluni.

Skeiðið er í trimum pørtum. Tann fyrsti parturin er eitt innleiðandi skeið, har skeiðsluttakararnir fáa frálæru um arbeiðsumhvørvi.

Í tí næsta partinum gera luttakararnir nakrar uppgávur um evnið, sum teir seinni leggja fram. Uppgávurnar verða loystar í bólkum, og tær eru ymiskar, men hava allar okkurt við arbeiðsumhvørvi at gera.

Síðsti parturin av av skeiðinum hevur verið hildin hesa seinastu vikuna. Her verða uppgávurnar lagdar fram og tikið verður saman um.

### Strongt arbeiðspláss

Uni Vestureið, politiinspektørur, sigur, at arbeiðið sum løgreglufólk kann stundum vera rættiliga hart og ógvusligt, og hetta kann merkja starvsfólkini.

– At vit halda hetta skeiðið skal ikki skiljast sum um, at vit hava trupulleikar við arbeiðsumhvørvinum hjá løgregluni, men vit royna allatíðina at betra arbeiðsumhvørvið, sigur Uni Vestureið.

Hann sigur, at skeiðið er fyribyrging fram um annað. Teir 23 luttakararnir hjá løgregluni eru øll fólk, sum hava við trygdarskipanina hjá løgregluni at gera.

### Góðar umstøður

Bæði Uni Vestureið og Karl Joensen, stjóri á Arbeiðseftirlitinum, eru samdir um, at arbeiðsumstøðurnar hjá løgregluni í Føroyum eru góðar.

– Tað er bert trupulleikar við hølisviðurskiftunum á støðini í Havn, sigur Uni Vestureið.

Karl Joensen fegnast eisini um, at løgreglan hevur tikið hetta stigið.

– Vanliga tá vit hava skeið, so eru tað nøkur frá ymsum arbeiðsplássum. Vit hesum fáa vit samband við alt arbeiðsplássið, og hetta lættir um hjá okkum, tí vit kunnu ikki vera allastaðni, sigur Fanny Kruse, sum starvast við kunning og undirvísing hjá Arbeiðseftirlitinum.

Í 2002 hevði løgreglan í Føroyum seksi mál undir hond, sum høvdu við arbeiðsumhvørvi at gera. Hesi málini endaðu øll við bót.

Men hóast eftirlitið stendur við, so síggja skeiðsluttakararnir fegnir, at størri dentur verður lagdur á tað fyribyrgjandi.

Trygdaruppgávurnar hjá einum arbeiðsplássið skal liggja hjá arbeiðsplássunum, sigur Karl Joensen.

Kravt er, at hvørt arbeiðspláss hevur trygdarumboð. Er arbeiðsplássið størri enn tjúgu starvsfólk krevst ein trygdarskipan.

Karl Joensen eggjar staðiliga øllum arbeiðsplássum at tryggja sær síni viðurskifti við arbeiðsumhvørvi.

Men rákið er tann rætta vegin, haldi bæði Karl Joensen og donsku undirvísararnir, Bjarne Gosvig og Jørn Bertelsen.

# Dýrir skaðar

**– Hvør arbeiðsskaði kostar í minstalagi 100.000 kr. fyri arbeiðsgevaran og enn meira fyri samfelagið, sigur Bjarne Gosvig, lærari í arbeiðsumhvørvi á Politiskúlanum í Keypmannahavn**

*F.v. Jørn Bertelsen, Uni Vestureið og Bjarne Gosvig. Jørn og Bjarne hava undirvíst føroyskum løgreglufólkum um arbeiðsumhvørvi.*
*Mynd: Jens Kristian Vang*



ARBEIÐSUMHVØRVI
*Heri á Rógvi*

Arbeiðsskaðar eiga og skulu vit sleppa undan.

Hetta haldi Bjarne Gosvig, kriminalassistent, og Jørn Bertelsen, vicepolitikommissør.

Teir báðir undirvísa um arbeiðsumhvørvi á Politi skúlanum í Keypmannahavn.

Seinastu tíðina hava teir undirvíst føroyskum løgreglufólkum um arbeiðsumhvørvi.

Teir fegnast eisini um, at løgreglan í Føroyum tekur hetta evnið álvarsliga.

– Tað er gott, at løgreglan í Føroyum tekur hetta stigið samlað. Tað er eisini stuttligt fyri okkum at sleppa at undirvísa her í Føroyum, sum vit gera í Danmark, sigur Jørn Bertelsen.

Uni Vestureið, politiinspektørur, sigur, at fyri løgregluna er arbeiðsumhvørvi kanska mest av øllum ein spurningur um trivnað.

– Alt snýr seg ikki bara um løn hjá starvsfólkum. Fólk vilja trívast og kenna seg væl í teirra størvum, og har er neyðugt at arbeiða við arbeiðsumhvørvi, sigur Uni Vestureið.

Hann leggur afturat, at arbeiðsumhvørvi kann vera so nógv – alt frá fysiskum rammum til happing.

### Kostar

Sambært teimum báðum donsku undirvísarunum er arbeiðsumhvørvi nakað, sum lønar seg hjá øllum at gera nakað við.

Tí arbeiðsskaðar kosta nógv – bæði hjá arbeiðsgevara, starvsfólki og samfelagnum.

– Ein álvarsamur arbeiðsskaði kann kosta nógv fyri arbeiðsplássini, tá hugsað verður um, hvat hetta inniber við fráveru og øðrum, sigur Bjarne Gosvig.

Hann vísir á, at kanningar gjørdar í Danmark vísa, at ein skaði kostar minst 100.000 kr. samlað, og oftani verða hesar upphæddirnar til bæði eina hálva og eina heila millión. Tískil kann tað loysa seg at gera nakað við arbeiðsumhvørvi, meta teir.

– Danska fyritøkan Danfoss hevur roknað út, at hvør arbeiðsskaði kostaði teimum 90.000 kr. So koma útreiðslurnar hjá starvsfólkinum og tí almenna afturat, sigur Bjarne Gosvig.



# Dagrøktarbørn fingu ein skelk



*Bumm segði tað, og vit fingu ilt í oyruni. Dagrøktarbørnini fingu ein skelk, men eru aftur glað.*
*Mynd: Finnur Justinussen.*

**Tað kundi endað galið, tá ein fløska, sum eitt barn hevði funnið, sprongdist undir einum vogni stutt eftir, at tað hevði lagt hana frá sær. Nú eru tey givin at heinta fløskur. Vit vitjaðu børnini hjá dagrøktarmammuni Gunnvá Akraberg Hansen dagin eftir.**

FLØSKUBUMBA
*Ingi Rasmussen*

»Bumm. Bang.«

Tað er dagin eftir hjá dagrøktini í Miðtúni 5 í Havn. Børnini Tróndur, Bára og Guðrið, øll tvey ár, og Hákun, sum er eitt ár, royna sum frægast at fortelja okkum, hvussu tað ljóðaði, tá tey komu í SMS um middagsleiti mikudagin.

Ein fløska, sum lá undir vogninum, vísti seg at innihalda evni, sum gjørdi, at hon brast við eitt øgiligt buldur, tá tey komu inn í SMS.

– Vit gingu ein túr gjøgnum miðbýin, sum vit eru von. Onkuntíð plaga vit at ganga niðan í SMS, og tað ætlaðu vit eisini hendan dagin. Tá vit komu til blómubeðið uttan fyri Vertshúsið, finnur Bára eina fløsku millum trøini. Vit stillaðu hana eftir høvdinum niður í kurvina undir vogninum sum vant, og so hugsaðu vit ikki meira um tað, sigur Gunnvá Akraberg Hansen, dagrøktarmamma.

Seinni skuldu tey vera mint so dyggiliga um hesa hálvliturs plastfløskuna, ið ikki var so ósek, sum hon sá út til.

### Av í oyra

Beint, sum tey ganga um portrið inn í Miklagarð, hoyrist eitt øgiligt buldur.

– Av í oyra. Fløskan larmaði á vegin. Fløskan segði bumm, siga børnini, tá tey við uppspílaðum eygum við hondum fyri oyruni greiða frá sínum upplivilsi, sum gjørdi tey kend um allar Føroyar.

Gunnvá varð kløkk, men ikki skelkað.

– Tað var eitt brak, sum vildi nakað. Eg reageraði als ikki beinanvegin. Trúði tað var onkur, sum hevði blakað okkurt eftir mær, ella eg hevði koyrt á okkurt. So sigur ein kona: Hygg fløskan! Hon var sundurskrødd og smeltað, men eg hevði ikki fantasi til at hugsa, at buldrið kom frá fløskuni. Ongin roknar við, at ein fløska brestur, sigur Gunnvá.

Í vogninum lá Hákun og svav. Hann merkti onki til hendingina, men hini børnini fingu ilt í oyruni. Fólk komu til, og ein maður tók fløskuna og ringdi til løgregluna.

### Skelkur seinni

Gunnvá fór víðari. Hon hevði fýra børn, hon skuldi syrgja fyri, so tað brúkti hon sína orku uppá. Tað var ikki fyrr enn seinni, um kvøldið, at hon fór at hugsa.

– Eg havi hugsað nógv um, hvat kundi verið hent. Hvat nú, um onkur hevði fløskuna í hondini, tá tað hendi? Kundi eg gjørt nakað øðrvísi? Men eg haldi ikki, at eg kundi gjørt nakað, tí hatta var so óskyldigt, sigur Gunnvá.

Foreldrini vórðu sjálvandi skelkað, tá tey hoyrdu um tilburðin. Serliga tí sagt varð, at plastpetti høvdu sett seg uppundir vognin sum prosjektilar. Men Gunnvá heldur ikki, at tað var so ógvusligt, tí hon sá onki stórvegis uppi undir vogninum. Bara smeltað plast. Men bresturin var harður kortini, tí kurvin bognaði, sum fløskan lá í.

– Eg haldi ikki eg reageri so ógvusligt, tá slíkt hendur. Men hvat skal man eisini brúka tað til. Børnini høvdu ikki havt tað betur av, at eg skríggjaði, sigur Gunnvá.

Hetta at savna fløskur hevur verið ein partur av gerandisdegnum hjá dagrøktini. Men nú ivast Gunnvá í, um tey sleppa at gera tað longur.

– Vit hava havt tað til fragd at heinta fløskur. Børnini hava hildið tað verið spennandi at savna pengarnar, sum vit fingu fyri tær, í eina bússu fyri seg. Tá vit hava havt nóg mikið, hava vit keypt okkum okkurt serligt fyri pengarnar, og tey hava verið errin. Men eg rokni ikki við, at eg fari at lata tey heinta longur. Tað tori eg ikki, sigur Gunnvá.

### Gevandi arbeiði

– Kom á spæliplássið, biður Bára, meðan hon klórar pekingkinseranum Pingu, sum liggur og rullar góðslig á gólvinum

Børnini eru glað. Skelkurin er farin av teimum. Tey spæla á gólvinum, sum onki varð hent. Uttanfyri er gott pláss, og stutt hiðani er spælipláss, sum tey plaga at fara á.

– Mær dámar ótrúliga væl at vera dagrøkt, sigur Gunnvá, sum hevur roynt seg í trý ár. – Tað er gevandi at arbeiða við børnum, og sjálvt um tey høvdu eitt traumatiskt upplivilsi í gjár, so koma tey skjótt yvir tað. Tey eru longu glað aftur, sigur Gunnvá.

Tað er kanska ikki av tilvild, at tað var hon, sum kom út fyri hesum. Tey eru úti hvønn dag ínæstan øllum veðri, og slíkt elska foreldur. Men tá mamma Tróndur hendan fer út gjøgnum hurðina, fær Gunnvá eina heilsan, sum bæði er stuttlig og hugvekjandi.

– Sprong ikki børnini í luftina í dag, góða.

## Einføld og vandamikil

FLØSKUBUMBA
*Ingi Rasmussen*

Í Miklagarði skilja tey betur nú, hví tey selja so nógva saltsýru og staniol. Tí hetta er einfalda uppskriftin til bumbuna, sum mikudagin um middagsleitið skelkaði eina dagrøktarmammu og fýra børn í SMS.

Sum skilst verður bumban gjørd við saltsýru og staniol, sum verður koyrd í fløskuna, áðrenn proppurin verður skrúvaður á.

– Bumbarn er sera løtt at gera, og eg havi sæð hana fyrr her í Klaksvík. Hon verður gjørd við frárensl-reinsi og silvurpappíri. Hon kann vera sera vandamikil, tí reinsievnið er etjandi. Kemur tað í eyguni, kann tað gera miklan skaða, um tað ikki verður skolað úr aftur beinanvegin, sigur ein sløkkiliðsmaður, sum hevur vent sær til Sosialin.

Útgerðin fæst í nærum hvørjum matvøruhandli, og tí er vert at hava eyguni eftir, hvat børnini fáast við. Tí hetta er vandamikið spæl.

– Fløskubumban hevur tann einleika, at hon ikki altíð brestur beinanvegin, kanska als ikki, ella eina heilt aðra tíð, so hon er sera vandamikil, sigur sløkkiliðsmaðurin.



*Løgreglan kannar fløskubumbuna*
*Mynd. Jens K. Vang*